# Felagið hjá Jón Róa í fíggjartrupulleikum

**Nýggja felagið hjá landsliðsleikaranum Jón Róa Jacobsen er sambært donskum miðlum komið í fíggjarligt óføri, men hetta avvísir leiðslan í felagnum**

ÚTISETAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Felagið hjá føroyska landsliðsleikaranum, Jón Róa Jacobsen, BK Frem, er komið í fíggjarligt óføri vilja danskir miðlar verða við.*

Tað sigur seg sjálvt, at tað hevur stóra ávirkan á inntøkumøguleikarnar hjá einum donskum fótbóltsfelagi, um tað flytur úr superliguni og niður í næstfremstu donsku deildina. Hjá nýggja felagnum hjá Jón Róa Jacobsen, BK Frem, hevur niðflytingin havt so mikið stóra ávirkan, at danskir miðlar vilja verða við, at BK Frem møguliga fer á húsagang.

**Stór skuld**

Sambært danska blaðnum Politiken hevur BK Frem eina skuld upp á slakar 10 milliónir krónur, sum tað tykist verða ógvuliga trupult hjá felagnum at gjalda aftur. Danska blaðið veit at siga, at BK Frem hevur skrivað til øll tey, ið felagið skyldar meiri enn 5.000 krónur. Felagið hevur spurt seg fyri, um tað ber til, at Frem rindar ein fjórðing av sínari skuld, og at restin síðani verður strikað.

Verður áheitanin frá Frem ikki gingin á møti av øllum teimum, ið eiga pengar til góðar hjá felagnum, merkir hetta, at felagið fer í gjaldssteðg og seinni á húsagang. Skuldi tað hent seg, at BK Frem fer á húsagang, hava allir leikararnir í felagnum frítt at fara, júst so sum tað hendi í Lyngby fyri nøkrum árum síðani.

**Eingin vandi fyri lønini**

Formaðurin í BK Frem, Filip West, avsannar tó, at felagið er við at fara av knóranum. Hann sigur við danskar miðlar, at síðani niðurflytingin gjørdist veruleiki, hevur leiðslan í BK Frem arbeitt við at umskipa bygnaðin og fíggjarviðurskiftini í felagnum. Felagið hevur sloppið sær av við nakrar teimum hægst løntu spælarunum, soleiðis at minkað er um lønarútreiðslurnar, sigur hann.

Filip West leggur yvir fyri donskum miðlum dent á, at leiðslan í BK Frem er heilt vís, at felagið megnar at gjalda spælarunum og øðrum starvsfólki løn alt komandi kappingarár.

Føroyski landsliðsleikarin Jón Rói Jacobsen tykist at verða við at koma fyri seg eftir drúgva knæskaðan, og tá ið Frem týskvøldið leikti venjingardyst ímóti hinum niðurflytarunum úr AB, spældi Jón Rói allan dystin í miðverjuni hjá nýggja felagi sínum. Dysturin endaði við einum 1-1 javnleiki.

## Millliónahall í donskum fótbólti

11 av teimum 12 fótbóltsfeløgunum í bestu donsku deildini farna kappingarár, hava seinastu fimm árini havt stórt hall. Tað skrivar Politiken.

Tað er bara felagið Parken Sport & Entertainment, sum millum annað rekur FC Keypmannahavn, sum hevur havt avlop hesi árini. Seinastu fimm árini hava slakar 100 milliónir ligið eftir í kassanum hjá FCK.

Samlað hava donsku feløgini mist 105 milliónir krónur seinastu fimm árini, og AB er greiður toppskorari við einum samlaðum halli á 72 milliónir krónur. Síðani kemus AaB við minus 31 milliónum, OB við minus 28 og AGF við minus 20 milliónum krónum.

## 75 milliónir fyri bóltin hjá Beckham

Bólturin, sum David Beckham sendi langt fram við málinum, tá ið hann skjeyt brotsspark í EM-fjórðingsfinaluni ímóti Portugal, er nú vorðin nógvar milliónir verdur. Eftir 48 tímar á uppboðssølu er boðið komið upp á 75 milliónir krónur, og líkt er til, at tað fer at vaksa.

– Vit hava ongantíð upplivað nakað slíkt. Vit royna at kanna hvørt einasta boð, sum kemur inn, fyri at tryggja okkum, at tey ikki eru føsl, sigur ein talsmaður fyri ebay í Spania.

25 ára gamli Pablo Carral loftaði bóltinum, tá ið Beckham skjeyt brotssparkið, og hann verður ein ríkur maður, tá ið uppboðssølan er liðug tann 22. juli.

## Fremad Amager nýggjan spælara

23 ára gamli Teddy Holst verður nú liðfelagið við teir tríggjar føroysku spælararnar í Fremad Amager. Teddy Holst kemur frá HIK, men hevur áður spælt fyri bæði Frem, Brøndby og Glostrup. Hann hevur eisini spælt fleiri landsdystir á ungdómslandsliðum hjá Danmark.

Teir báðir verjuspælararnir Bilal Yassine og Erkan Aslan hava ikki fingið sínar sáttmálar við Fremad Amager longdar, og teir gevast tí í felagnum.

# Gunnlaugur á odda

**Íslendski veteranurin, Gunnlaugur Jónasson úr Hjólreiðufelag Reykjavíkur, hevur lagt seg á odda eftir prologin í Statoil kring Føroyar**

STATOIL KRING FØROYAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*




*Tríggir teir fremstu á prologinum í Statoil kring Føroyar: í miðjuni vinnarin Gunnlaugur Jónasson, nr. 2 Gunnar Dahl Olsen og nr. 3 Niels Jakob Thomsen.*

Mikudagin var farið undir árligu Statoil kring Føroyar súkklukappingina. Ein prologur var súkklaður í Klaksvík, og í ár var prologurin ein einkultstartur upp á átta kilometrar.

**Útlendingarnir frammalaga**

Tað var íslendski veteranurin, Gunnlaugur Jónasson, sum stóð seg best í kappingini mikudagin. Hann brúkti tíðina 11 minuttir og 30 sekund, og næstur honum var Gunnar Dahl Olsen, sum hevði átta sekundir fleiri enn íslendingurin um at súkkla teinin. Danin Niels Jakob Thomsen hevði triðbestu tíðina, og hann var einans fýra sekund aftan fyri Gunnar. Næstfremsti føroyingurin er Sverri Mohr Edvinsson, ið liggur nummar fimm í samlaðu støðuni.

Eftir evstamark hjá blaðnum í gjár var súkklað í Eysturoynni. Byrjað varð á Oyri, og súkklað var um Eiðisskarð til Oyndarfjarðar, gjøgnum Leirvíkartunnilin og aftur eftir tí gamla vegnum, áðrenn súkklað var út eftir Skálafjørðinum út á Nes og runt Agnið, áðrenn komið var á mál við Statoilstøðina í Runavík. Teinurin, ið var súkklaður í Eysturoynni, var góðar 131 kilometrar til longdar.

Í dag verður súkklað á Sandoynni, og aftur í dag er talan um einkultstart. Hesaferð er einkultstarturin tó væl longri, enn hann var í prologinum, tí á Sandoynni verður súkklað slakar 21 kilometrar.

**Íslendingar eisini best hjá ungdóminum**

Ein serstøk kapping er eisini fyri ungar súkklar, og eisini her eru íslendingarnir fremstir. Tann bert 15 ára gamli Anton Ørn Elfarsson úr Reykjavík vann mikudagin prologin, og næstur honum var landsmaðurin Kári Brynjolfsson, eisini úr Reykjavík. Besti føroyingurin hjá teimum ungu var Torkil Veyhe úr Tórshavnar Súkklufelag, men nokk so fitt er upp til teir báðar íslendingarnar.




# Leiðari og telduvørður til nýggja KT-tænastu

**Fróðskaparsetur Føroya hevur skipað eina nýggja KT-tænastu. Nú verður søkt eftir tveimum fólkum, einum KT-leiðara og einum telduvørði, sum skulu skipa, menna og útbyggja KT-tænastuna**

Nýskipaða KT-tænastan hevur ein týðandi leiklut í menningini av Fróðskaparsetri Føroya.

KT-tænastan hevur ábyrgdina av teldunetinum hjá stovnunum á Debesartrøð og nær-netinum á Fróðskaparsetrinum. Hon skal stuðla setursdeildum og brúkarum við KT-nýtslu. Hon skal samstarva og samskifta við stovnar og KT-veitararar uttan fyri Fróðskaparsetrið. Og KT-tænastan skal ráðgeva setursráðnum í yvirskipaðum KT-málum frameftir.

Tað krevur tænastusinnað fólk, sum bæði eru tøkniliga væl fyri og hava visjónir. KT-leiðarin skal saman við telduvørðinum vera við til at menna og útbyggja nýggju KT-tænastuna.

**KT-leiðari**
KT-leiðarin hevur yvirskipaðu ábyrgdina og kemur at standa fyri menningini av nýggju KT-tænastuni.
Vit kunnu bjóða eitt mennandi og spennandi arbeiðsumhvørvi, har samstarvað verður við fremstu føroysku granskararnar.

Vit rokna við, at umsøkjarar hava drúgvar royndir við at menna og skipa strategiskt KT-arbeiði. Tú hevur neyðuga førleikan at leggja framtíðarætlanir fyri KT-økið og persónligu eginleikarnar at fremja tær í verki. Tú hevur hægri útbúgving ella viðkomandi royndir innan kunningartøkni, leiðsluroyndir og góð samstarvsevni.

**Telduvørður**
Telduvørðurin hevur ábyrgdina av, at teldurnar virka nøktandi í dagliga arbeiðnum, og at data verða goymd og brúkt á skilabesta hátt.

Vit rokna við, at tú hevur royndir við teimum vanligastu KT-forritunum og ert vanur at vegleiða brúkarar í nýtsluni av teimum. Tú hevur viðkomandi útbúgving ella starvsroyndir, ert íðin og hevur áræði og góð samstarvsevni.

**KT-tænastan**
KT-tænastan fevnir um Windows- og Linuxskipanir á brúkarateldum, Novell-netskipan og Novell Group-Wise postskipan, sum umsøkjarar mugu hava hollan kunnleika til.

Høvuðsbrúkarabólkarnir eru granskarar, undirvísarar, fyrisitarar og studentar, sum brúka KT-skipanir dagliga til samskifti, gransking, undirvísing og fyrisiting.

Dagliga arbeiðið av datanetinum á Debesartrøð fevnir í stuttum um
- at hava eftirlit við kjarnuskipan og samsvarandi samskiftisútgerð
- at viðlíkahalda felags trygdartænastur hjá stovnunum
- at samskifta og samstarva við netvørðarnar á teimum fimm stovnunum
- at umsita web-, ftp-, navna- og postambætararnar
- at samskifta við veitarar av KT-útgerð sum heild
- at samskipa dagføringar, umleggingar og útbyggingar í netskipanini

**Treytir og umsóknir**
Lønar- og setanarviðurskifti verða sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um størvini og tøknilýsing kunnu fáast við at venda sær til Anniku Sølvará á telefon 352500 ella teldupost annikas@setur.fo

Umsóknir við prógvum, ævisøgu (CV) og møguligum viðmælum skulu stílast til Setursskrivstovuna í seinasta lagi 16. august 2004. Vinarliga ger vart við, hvat starv tú søkir, ella um tú søkir bæði.

Størvini verða sett frá 1. september ella skjótast til ber.

Setursskrivstovan
J.C. Svabosgøta 14
Postrúm 272
FO-100 Tórshavn

*Fróðskaparsetur Føroya er stovnur við 40 starvsfólkum og 150 studentum. Virksemið fevnir í høvuðsheitum um undirvísing, gransking, kunning og fyrisiting.*

*KT-tænastan kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við telduvørðir á stovnunum, sum saman við Fróðskaparsetrinum mynda netsamstarvið á Debesartrøð: Fiskirannsóknarstovan, Landsbókasavnið, Landsskjalasavnið og Náttúrugripasavnið. Talan er um eina fjølbroytta netskipan, sum bindur saman fimm stovnar í 12 bygningum við tilsamans 135 brúkarum.*

FRÓÐSKAPARSETUR · FØROYA ·

Fróðskaparsetur Føroya · J.C. Svabosgøtu 14 · Postrúm 272 · 110 Tórshavn · Tel 35 25 00 · Faks 35 25 01 · setur@setur.fo · www.setur.fo

www.sansir.fo





Føroya Sparikassi hevur 16 privatkundadeildir og 2 vinnulívsdeildir kring landið. Í Føroya Sparikassa starvast 167 fólk. Á deildunum veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Hetta er í tráð við visión Sparikassans, sum er at vera brúkaravinarligasti peningastovnur í Føroyum. Á grannskoðanardeildini, Yviri við Strond 2, starvast 3 fólk.

## GRANNSKOÐANARLEIÐARI

Høvuðsuppgávan hjá innanhýsis grannskoðanini er at grannskoða ársroknskapin hjá Føroya Sparikassa, dótturfeløgum og Sparikassagrunninum. Grannskoðanin verður framd samsvarandi góðum grannskoðanarsiði og við atliti til galdandi lóggávu, reglur og viðtøkur.

Grannskoðanin fer fram í samstarvi við uttanhýsis grannskoðanina. Arbeiðið fevnir eisini um ráðgeving, eitt nú innan grannskoðan, roknskap og skatt.

Føroya Sparikassi vil skapa eitt arbeiðsumhvørvi, har bæði starvsfólk og kundar trívast og mennast.

Talan er um sjálvstøðugt arbeiði, har samstarvsevni, nærlagni, effektivitetur og slagkraft eru tíðandi eginleikar. Dentur verður lagdur á, at innanhýsis grannskoðanin er virðisøkjandi í sínum arbeiði.

Umsøkjarar skulu hava eina ástøðiliga útbúgving, ið krevst fyri at gerast statsautoriseraður ella skrásettur grannskoðari. Eisini skulu umsøkjarar hava luttikið í praktiskum grannskoðanararbeiði í minsta lagi í 3 ár seinastu 5 árini.

Grannskoðanarleiðarin verður settur av nevndini í Føroya Sparikassa P/F.

Lønin verður ásett eftir avtalu.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til:

Bjarna Poulsen, grannskoðanarleiðara
e-mail: bjarni.poulsen@sparikassin.fo
tlf.: 348560

Umsóknarfreistin er 16. august. Umsókn við C.V. og avriti av prógvum skal sendast til:

Føroya Sparikassi P/F
Att.: Frithleif Olsen, nevndarformaður
Postsmoga 1309
110 Tórshavn

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

REPROZ